LM-099/2023

Fylgiskjal 30
Tvangsvágur 20-2-24

Hoyringsskriv til uppskotið um burðardygga ferðavinnu

Her er mín soga:
Í 1987, je gekk á 22. ári, keypti je tvey matr.nr., annað við ástandandi sethúsum, og hitt, einbýttur hagi á 24 gyllin (einbýttur í 1874).
Hagin liggur soleiðis fyri, at gangast má igjognum hann, fyri at koma til eitt av mest vitjaðu ferðamálum í oynni. Je havi aldrin forað fólki at ganga igjognum mín haga, og ætli heldur ikki at gera tað, men skal ein finna sje í ollum, sum hendur í ferðavinnu hopi'
Tað sum je haldi ikki er í lagi, er at ferðaskrivstovur í Føroyum og uttanlanda selja ferðir, til upplivingarhungrandi ferðafólk, og taka gjald fyri at ganga í mínum haga, og ikki so sjáldan órógva virksemi í haganum.
Hvor einasta ár, ikki bara um summari, ganga hopin av ferðafólki (1000 tals) igjognum mín haga. Je eri ongantið spurdur um loyvi ella kunnaður um túrar, sum eru fyriskipaðir av ferðaskrivstovum, hvorki her í oynni ella aðrastaðnis í Føroyum.
Havi gjort vart við meg hjá ferðaskrivstovu, men tey vendu ongantið aftur. Tó so, eg havi einaferð fingið uppringing um at fáa loyvi at ganga igjognum hagan og var hetta frá einum bindiklubba í Tuglafirði, og sjálvandi sluppu tær tað.
Í skeytinum, sum varð tinglýst í 1987, og frammanundan, hjá teimum sum áttu matrikkulin undan mer stendur, at ognin skal nýtast við teimum rættindum, lunnindum og skyldum, sum eru lýstar á ognini, har stendur einki um ferðavinnu.
Mín spurningur er, hvor hevur ræðisrættin á minari ogn - Guðri Højgaard, Hogni Hoydal ella je? Ella er ognarrætturin sum er umtalaður í grundlógini ikki galdandi longur, tejendomsrætten er ukrænkelig).
Í sínum verður sagt í uppskotinum, og tað sama siga ferðasmiðirnir, at túrar ikki verða gjordir tá haruveiða er í haganum, men er tað nú so?
Je havi verið partur í haruveiðuni her í bygdini í 40 ár, tey seinast 24 árini sum formaður. Je kenni einki til, at okur hava havt trupulleikar av ferðafólki, tá okur hava verið á veiðu, fyrrenn í ár, sum eisini var fyrstu ferð, at okur kunngjordu væl og virðiliga um haruskjótingina, við nágreiniligari fragreiðing og korti av økinum, sum skotið bleiv í. Men alt til fánýtis, tí hetta varð eisini fyrstu ferð, oll árini je veit um, at vandastoða mundi staðist av, tí viðkomandi gongufólk vóru í økinum.
Mín vón er, at uppskotið, um tað kemur á tingborð, ikki verður samtykt í hesum líki.
Moguliga eru okur, sum vara av og eiga jørð, blivin ov fúr fyri herrópunum um fólksins ogn, sum hava rungað um allar geilar seinastu árini.
Je minnist abban onkuntið taka til, hann var maður av fáum orðum, at sosialistarnir verða ikki tilfreds, fyrrenn oll eiga alt og ongin eigur nakað, so teir nærkast helst málinum nú.

Vinarliga


Hallur í Heiðunum

LM-099/2023

Gøtan til Hvannhaga

Her eru tvær myndir, ið je havi tikið á heysti í 2023.





Fyri fáum árum síðani var henda rásin vallað og á myndini til høgru, var alt somuleiðis vallað. Hetta eru bert tveir stuttir teinar av gøtuni til Hvannhaga. Á slættanum norðari á leiðini er sjónligt slit á uml. 30 metra breiðum øki. Myndirnar eru tiknar annað heystið aftaná átakið "closed for maintenance", men áðrenn sherpa trappan varð tikin í nýtslu, sum uttan iva fer at økja um ferðsluna til Hvannhaga.

Vinarligar

Hallur í Heiðunum